

Bollsta Dolphin, nýggjur pallur til Atlantsmótið

# Chevron risapall til Atlantsmótið

Deil:

**Jan Müller**

13.02.2015 - 19:04

Oljan.fo

Tað eru ikki bara BP og Shell, tvey av heimsins størstu oljufeløgum, sum hóast lækkandi oljuprísir, framhaldandi hava stórt álit á oljuleiðunum millum Hetland og Føroyar. Eisini amerikanski oljurisin, Chevron, sum saman við BP og Shell øll hava verið partur av føroysku leitingini, ger nú ein ordiligan vørr á Atlantsmótinum. Seinni í hesum árinum, helst í triðja ársfjórðingi, kemur sera væl útgjørdi pallurin til djúpt vatn og harðbalt veðurlag, Bollsta Dolphin til oljuleiðirnar vestan fyri Hetland. Chevron hevur gjørt avtalu við Fred. Olsen Energy um at leiga pallin í fimm ár at bora vestan fyri Hetland. Pallurin er í løtuni í gerð á skipasmiðju í Suðurkorea.

Útlendskir miðlar, sum umrøða pallin, hava tó ikki enn gjørt greitt, hvar á Atlantsmótinum nýggi pallurin fer at seta borin í. Men upprunaliga varð hann bygdur til at bora brunnar í sambandi við eina stóra útbyggingarætlan á Rosebank-kelduni skamt frá føroyska markinum. Tann ætlanin varð tó løgd aftur á hillina fyri góðum ári síðani, fyri so at verða tikin framaftur. Eftir at Statoil tók seg úr Rosebank-loyvinum, og enn eitt felag, sum er virkið í Føroyum, OMV keypti seg inn í Rosebank, er gongd aftur komin á fyrireikingarnar av eini møguligari útbygging. Seinastu útmeldingarnar frá pørtunum hava verið, at feløgini vilja meta um útbygginginga av nýggjum og vita, um hon ikki kann gerast bíligari enn upprunaliga mett.

Hvussu og ikki, so verður pallurin klárur um eitt hálvt ár ella so, og til ta tíð vita vit nokk meira um ítøkiligu ætlaninar.